Nr. 8 • januar 2011

# MIÐ & MAGN




Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Leif Joensen fekk prógv, sum fjarlesandi skipsførari á Vinuháskúlanum.

**UMSITING**
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900



# Stuttur jólafriður

Jólafriðurin hesaferð var stuttur hjá FSN og MF, beint eftir nýggjár varð aftur farið undir sáttmálasamráðingar við Reiðarafelagið.

Tað er ongin loyna, at mótpartur okkara hevur sett fram krøv um stórar lækkingar í samlaðu hýruútreiðslunum.

Í hesum samráðingarumfarinum hava FSN og MF verið saman til samráðingarfundirnar.

Fiskimannafelagið hevur verið einsamalt til sínar fundir við reiðararnar. Tó hava øll manningarfeløgini samskift neyvt alla tíðina. Vit hava lagt okkum eftir at samskipa okkara sjónarmið og strategi. Hetta hevur higartil eydnast væl, og tað hevur ikki eydnast mótpartinum at spjaða okkum.

Reiðarafelagið hevur havt eina greiða ætlan undir øllum samráðingunum. Teir hava roynt at gjøgnumtvinga munandi niðurskurðir í hýrunum við at vísa til torføru støðuna hjá ávísum skipabólkum og hækkandi oljuprísum.

Orðalagið hevur verið so harðligt, at hótt hevur verið við slitið frá báðum pørtum fleiri ferðir. Men tá vit hava viðgjørt einstøku skipabólkarnar, so hevur borið til at finna loysnir, sum báðir partar duga at síggja fyrimunir í.

Nakrir skipabólkar eru avgreiddir, meðan prinsipiel sjónarmið hjá Reiðarafelagnum forða fyri loysn hjá øðrum skipabólkum. Generellar niðurskurðir yvir allan flotan hava manningarfeløgini víst staðiliga frá sær.

Enn er gongd á, og vit hava eisini møguleika til at innkalla semingsstovnin. Tað tekur tíð at viðgera, um oljan skal verða ein felagsútreiðsla í øllum sáttmálum. Manningarfeløgini hava líltan áhuga í at viðgera hendan spurning undir tíðarpressi og hóttandi lock out.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Eyðstein Djurhuus ábyrgdarblaðstjóri*




# Innihaldsyvirlit

Decision3 Greensteam . . . . . . 4
Próvhandan á Vinnuháskúlanum . . . . . . 8
FSN aðalfundur . . . . . . 14
Petur Egholm í brennideplinum . . . . . . 25
Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag . . . 26
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . . 28
Føroyski skipsportalurin www.skipini.fo . . . . . . 32
Maskinmeistaraflokkur námsferð í Danmark . . . . 34
Dráttur, kolfýrdur trolari . . . . . . 36
Rock Trawldoors í Vági gongur væl . . . . . . 38









# SELJA ÚTLENDINGUM FØROYSKA VITAN

**Føroyska fyritøkan Decision3 selur nýggja vitan, sum við tøknifrøðiligari hjálp sparir nógva orku umborð á skipum**

Nakrir ungir føroyingar hava ment eina skipan, nevnd Greensteam, sum ger, at skip, sum fáa skipanina umborð, spara munandi nøgdir av orku.

Teir sita í einum nýggjum bygningi í Lucas Debesargøtu mitt í Havn og selja eina orkusparandi skipan til danska handilsflotan. Samstarvið er millum føroysku fyritøkuna Decision3 og danska reiðaríið Norden, sum rekur bæði tangaskip og bulkskip. Her sita ungir menn við teldum og menna eina nýggja skipan, sum tykist sera einfald, men kann fáa rættiliga stóra ávirkan á bæði orkuútreiðslurnar hjá keyparanum, eins og hon eisini fer at minka munandi um útlátið frá teimum skipum, sum fara at nýta hesa skipan.

– Vit hava við góðum úrsliti sett skipanina umborð á nøkur skip hjá Norden, og kanningar vísa, at hetta veruliga sparir teimum nógva orku og harvið útreiðslur, sigur Dánjal Jákup Jacobsen stjóri í Decision3, sum hevur verið við til at menna skipanina.



*Dánjal Jákup Jacobsen stjóri í Decision3*

## BYRJAÐI VIÐ GRANSKING

– Alt byrjaði við eini granskingarverkætlan í 2006, greiðir Dánjal Jákup Jacobsen frá. Tá fingu vit játtaðan stuðul frá Granskingarráðnum, Vinnuframagrunninum og Amerada Hess samtakinum til at fara undir gransking. Síðan hevur hendan granskingin ment seg til eina ítøkiliga verkætlan, sum nú fýra ár seinni er seld til útlendskar keyparar, og sum vónir eru fyri at kunna selja aðrastaðni enn í Danmark eisini.

At byrja við hildu teir seg mest til at máta djúpgangin á skipum. Trupulleikin tá var, at so at siga eingi skip høvdu álítandi mátarar, ella mátarar yvirhøvur, greiðir hann frá. So fyrsta hugskotið var at gera betri mátarar.

Hetta hugskotið menti seg so víðari, til tað í dag er vorðið til eina skipan, sum ger, at skip, sum hava hana umborð, ku$nnu minka munandi um orkunýtlsuna, tá siglt verður. Skipanin gongur í stuttum út uppá at fáa skipið at flóta soleiðis, at mótstøðan verður sum minst, tá siglt verður, og av tí verður eisini orkunýtslan minni.




*6 fólk eru í starvi hjá Decision3*

– Og tað er longu ávíst, sigur Dánjal Jákup Jacobsen. Reiðaríið Norden hevur skipanina umborð á fleiri av teirra skipum, og teir hava so fylgt við, hvussu orkunýtslan er á einum av hesum skipum í mun til eitt systurskip, sum ikki hevur hesa skipanina umborð. Og tað vísti seg, at „okkara“ skip lá 2,5% betri fyri enn hitt skipið. Talan er um eitt tangaskip upp á 50.000 tons, sum fyrsta árið spardi einar 600.000,- krónur í oljunýtslu í mun til systurskipið, sum ikki hevði Greensteam skipanina umborð. Felagið hevur eisini størri bulkskip, sum teir fara at gera royndir við.

## FRÁ GRANSKING TIL SØLU

Tey eru seks fólk í starvi hjá fyritøkuni Decision3, greiðir Dánjal Jákup Jacobsen frá. Talan er um verkfrøðingar og telduforritarar, sum at kalla arbeiða við Greensteam skipanini burturav.

Tað er ikki nakað nýtt, at djúpgangurin á skipi ávirkar mótstøðuna. Teirra áhugi var so at royna at finna útav, hvat gerast kundi við tað, og hvussu hetta kundi gerast. Hesum varð so granskað í, og nógvar royndir vórðu gjørdar, áðrenn teir hildu seg hava nakað úrslit at vísa á.

– Tað var ikki soleiðis, at vit gjørdu modelroyndir í einum kari, sum onkur kanska heldur, sigur hann. Allar royndirnar hjá okkum vóru matematiskar. Tað vil siga, at vit roknaðu okkum fram til tað, vit hildu, skuldi gerast fyri at minka um mótstøðuna.

Trimmið á skipinum, sum er munurin millum forenda og afturenda, ávirkar framdriftsmótstøðuna. Við at broyta trimmið, ber til eisini at broyta framdriftsmótstøðuna, og tað var júst hesum, teir løgdu seg eftir.

– Í prinsippinum taka vit eitt skip og finna fram til tað optimala trimmið í mun til umstøðurnar, sigur Dánjal Jákup Jacobsen.

Og umstøðurnar kunnu vera so nógvar, sum gera, at skipið ikki hevur optimalu ferðina. Tað er ikki bara trimmið, uttan eisini slíkt sum alduhædd, vindur og avdrift. Hvussu róðrið stendur, og kanska eisini hvussu djúpt er undir skipinum.

Skipanin roknar so út, hvat best er at gera, og kemur við einum uppskoti til, hvat gerast kann fyri at fáa sum mest burturúr. Men hon broytir ikki kós ella minkar ella økir um ferðina. Tað má tann, sum ábyrgdina hevur á brúnni, hóast alt gera.

## DANIR ÁHUGAÐIR

Skipanin er alla tíðina í menning, men hon verður kortini boðin út á altjóða marknaðinum, og danska reiðaríið Norden hevur keypt sjey skipanir og sett umborð á skip í flotanum.

Tað var ikki so, at skipanin bara uttan nakað virkaði hundrað prosent, tá hon kom umborð, við-



*Mátari, sum Decision3 hevur ment til GreenSteam.*



*Ólavur Simonsen í ferð við at seta ein mátara á eitt tangaskip í Kina.*

gongur Dánjal Jákup Jacobsen, Men arbeitt hevur alla tíðina verið við at menna hana, og nú tykist hon virka bara heilt væl.

Og har, hon er ísett, eru teir væl nøgdir við skipanina. Mett verður, at íløgan fer longu eftir einum ári at vera spard inn aftur í minni oljunýtslu.

Á skrivstovuni hjá Decision3 siga tey, at oljuprísir og altjóða reglur um útlát arbeiða við teimum í hesum førinum.

At tað júst var Norden, sum fyrst tók við hesi nýggju skipanini, halda tey ikki vera so løgið. Tí júst reiðaríið Norden man vera eitt tað mest umhvørvistilvitaða reiðaríið í heiminum yvirhøvur. Og tá Decision3 hevði gjørt roynd-arskipanina, ivaðust teir á Norden ikki í at gera royndirnar.

### FARIN Á MARKNAÐIN

Skipanin Greensteam er farin á marknaðin, og hóast tað enn bert er Norden, sum hevur keypt hana, verður arbeitt við at fá hana út á altjóða marknaðin.

Men eisini hjá føroyska fiski-flotanum átti hon at verið áhuga-verd, heldur Dánjal Jákup Jacobsen. Serliga hjá trolarunum, sum jú brúka heilt nógva olju, skuldu verið pengar at spart.

Teir hava tikið patent upp á teir grundleggjandi partarnar av skip-anini, og royna í løtuni at fáa patent upp á alla skipanina, sum hon er, sigur hann.

Sæð úr einum føroyskum sjónar-horni átti hendan skipanin at verið rættiliga áhugaverd. Tí hendan verkætlanin vísir, at gransking og menning ber til í Føroyum. Her er ávíst, at vitanargrundað vøra kann útflytast á altjóða marknaðin.

– Eg vóni, at føroyski hugburðurin fer at broytast soleiðis, at vitanin verður meira spjadd og ikki genera-liserað, sigur hann at enda.




*Mynd av nøkrum faktorum, sum ávirka effektivitetin hjá einum skipi*

## Decision3 board of directors

**The Decision3 board consists of Árni Ellefsen, chairman, Erik Østergaard and Torben Ravn.**



*Árni Ellefsen*

The chairman is Árni Ellefsen, director of NEMA a Faroese IT company. Árni Ellefsen has previously been director and owner of Spekt which is an audit & accounting company and brings a wealth business skills and knowledge to the chairman function.



*Erik Østergaard*

Erik Østergaard is CEO of Dansk Transport & Logistik, the Danish branch organization for road-based transportation. He has extensive executive experience from the maritime sector, such as having been CEO of Scandlines.



*Torben Ravn*

Torben Ravn is director of Erria A/S (ret.), an international shipping and ship management company based in Denmark, and brings vast experience of shippping and technical ship management knowledge to the company.

# PRÓVHANDAN Á VINNUHÁSKÚLANUM





**Próvhandan varð á Vinnuháskúlanum fríggjadagin 17. desember 2010.**

**Umframt 35 lesandi, sum fingu prógv, vóru eini 200 gestir samlaði til hátíðarhaldið. 9 maskinmeistarar, 13 skiparar og 13 skipsførarar fingu prógv handað.**



*Jóan Petur Patursson:*

## Røða til próvhandan í Vinnuháskúlanum

Eg vil vegna Maskinmeistarafelagið ynskja øllum tykkum sum hava lokið prógv í dag og tykkara nærmastu hjartaliga tillukku.

Nú hava tit kempa í nógvar dagar og kvøld og nokk eisini nakrar nætur við fyri at røkka hesum máli tit settu tykkum tá tit byrjaðu á skúlanum maskinmeistari og skipsførari fyri 3 ári síðani og skipari fyri 1 1/2 ári síðani, so tað má følast gott at standa við próvnum í hondini í dag.

Hesin dagur sum er tykkara,skulu tit njóta saman við tykkara kæru, sum ikki hava sæð nógv til tykkum tað síðstu tíðina tá ið tit hava lisið og repitera áðrenn tit eru farnir til próvtøkur.

Men nú skulu tit út aftur í vinnuna at arbeiða, og vóni eg at tað má gangast tykkum væl við at finna størv á sjónum ella á landi hvar í tit kunnu brúka tykkara útbúgving.

Tað er ikki eins lætt í dag, sum tað var fyrr at fáa starv á sjónum við ongum vinnubrævi.

Maskinmeistarafelagið hevur roynt, at fingið SSL og FVE at taka juniormeistarar umborð á Smyril og Brimil, teir eru jaligir at tosað við um tað, men trupulleikin hjá teimum er at teirra játtan er so lág, at teir ikki hava ráð at hava juniormeistarar umborð á skipunum.

Vit eru eisini í dialogi um juniormeistarar við tey reiðarí sum flagga skip síni inn í FAS skránna.

Fyri mítt viðkomandi er dagurin heilt serligur við tað at sonurin hevur lokið prógv sum maskinmeistari tað sama, sum eg gjørdi í København fyri 25 árum síðani.

So enn einaferð hjartaliga tillukku við próvnum øll somul og vil eg ynskja øllum eini gleðilig jól.



## Fjarlestur til skipsførara

Vinnuháskúlin hevur havt eina royndarskipan, har lesandi kundu lesa fjarlestur til skipsførara. Leif Joensen fekk prógv, sum fjarlesandi skipsførari á Vinuháskúlanum.

# PRÓVHANDAN Á VINNUHÁSKÚLANUM







## MASKINMEISTARAR:

Hesar virðislønir vóru lætnar:

1. Daniel Nielsen, fototól frá BANKNORDIK
2. Einar A. Petersen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum
2. Rói S. Patursson, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum *(báðir fingu sama samanlagda próvtal)*

**Ídnisvirðislon:**

1. Daniel Nielsen, gullur frá A. P. Møller

## SKIPARAR:

Hesar virðislønir vóru lætnar:

1. Esmar P. Petersen, kikara frá P/F Thor
2. Osvald Danielsen, barometur og klokkusett frá Faroe Agency
3. Brynjálvur Niclasen, barometur og klokka frá Faroe Ship

## SKIPSFØRARAR:

Hesar virðislønir vóru lætnar:

1. Tina Grønbech, gullur frá A. P. Møller
2. Leif Joensen, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar

**Primus motor:**

1. Jón Jóhannessen, ur, knív og pennasett frá Søfartens Ledere

**Hægsta próvtal hjá navigatørunum:**

1. Esmar Petur Petersen, barografur frá Skipara- & Navigatørfelagnum, sum verður givin fyri hægsta próvtal í Tórshavn ella Klaksvík.



MASKINMEISTARAR:

*Arnfinn í Bartalstovu, Einar A. Petersen, Jónleif Mørkøre, Rói S. Patursson, Per Súni Poulsen, Daniel Nielsen, Hallur Joensen, Poul Jacob Poulsen, og Sverri Jacobsen.*



SKIPARAR:

*Brynjálvur Niclasen, Hans A. Jacobsen, Jón Johansen, Niklas G. Joensen, Osvald Danielsen, Høgni Djurhuus, Esmar P. Petersen, Jákup á Dul Sørensen, Jón M. Gærdbo, Ólavur Johannesen, Tummas S. Johannesen, Aron Jacob Berg, og Pole Stenberg (er ikki við á myndini).*



SKIPSFØRARAR:

*Albjørg Joensen, Andreas Jacobsen, Ditlev Winther, Tina Grønbech, Davis Dalbø, Finnbogi Berg, Fríðrik Sivertsen, Leif Joensen, Jan Vestergaard, Jógvan Joensen, Høgni B. Rasmussen, Martin S. I. Joensen og Jón Jóhannessen.*

Faroe Ship takkar fyri farna árið

og ynskir øllum eitt gott nýggjár

FAROE SHIP




Við tøkk fyri tað farna ynskja vit eitt eydnuberandi nýggjár



FAGRABERG



VESTURVÓN



STAPIN

# FORMANSFRÁGREIÐING 2010

*Eyðstein Djurhuus, formaður*
*28. desember 2010*

**Sambært viðtøkum felagsins skal formaðurin leggja fram frágreiðing, um virki felagsins á aðalfundinum. Nevndin hevur havt hesa frágreiðing til ummælis. Eisini verður komið inná onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri felagið og limir okkara.**



*Eyðstein Djurhuus, formaður*

## DAGLIGA VIRKSEMIÐ

Seinasta árið hevur verið merkt av torføru støðuni, landshúsarhaldið er komið í. Ágóðarnir, sum okkara sjófólk fáa, eru komnir undir stórt trýst. FSN hevur sum frægast, roynt at verja áhugamálini hjá limum okkara. Vit mugu tíverri staðfesta, at tann vælvild sum higartil er víst okkara sjófólki, er alsamt minkandi millum partar, av okkara politiska landslagi.

Nevndin hevur verið regluliga saman til fundir. Eisini hava nevndarlimir verið innkallaðir til samráðingar og aðrar fundir. Formaðurin hevur røkt ta umboðan, sum FSN hevur í ymiskum nevndum og ráðum.

Skrivstovan er opin hvønn gerandisdag og tað er rættuliga fitt av fólki, sum vendir sær til okkara við ymiskum ørindum.

## SÁTTMÁLIN FYRI FISKISKIP

Felagið hevur ført fram fleiri ferðir, at setanar- og lønarviðurskiftini í fiskiskipaflotanum mugu dagførast munandi. Manningarfeløgini høvdu seint í summar og tíðliga í heyst, nógvar fundir við Reiðarafelagið um hetta mál. FSN førdi fram, at vit ynsktu eina garantihýruskipan, sum part av verandi sáttmála. Vit vóru sinnaðir at slaka nakað uppá verandi býtisprosent, fyri eina slíka skipan. Samstundis ynsktu vit, at garantihýrurnar skuldu ásetast fyri hvønn skipabólk sær. Eisini lótu vit møguleikan standa opnan, at halda veikastu skipabólkarnar uttan fyri hesa skipan.

Reiðarafelagið hevði eitt uppskot um eina útbygda minstulønarskipan fyri allar umborð og allar skipabólkar. Hendan varð ásett soleiðis, at veikasti parturin av flotanum kundi gjalda hana. Síðani skuldi skipari og manning fáa eitt bonus útfrá samlaða úrslitinum hjá reiðarínum.

Manningarfeløgini hildu fast við, at ein nýggj lønarskipan mátti taka útgangsstøði í verandi sáttmálum, og síðani endaðu hesar samrøður í tvístøðu og hørðum orðadrátti.

Reiðarafelagið segði síðani allar sáttmálarnar upp. Partarnir hava lagt sáttmála krøv síni fram og nakrir samráðingar fundir hava verið. FSN hevur sett fram krav um eina garantihýruskipan, sum part av verandi sáttmála. Krøv eru sett fram, um at setanarviðurskiftini skulu vera líknandi teimum í farmaskipaflotanum. Eisini eru onnur krøv við, sum hava verið sett fram fyrr.


*Nevndarlimir frá høgru: Leivur Christiansen, Eyðstein Djurhuus, Leif Joensen, Johannus Jacobsen, Dan Ingi Andreasen, Regin Nónstein, Annfinn Garðalíð og Ellintur M. Abrahamsen.*

Sáttmálakrøvini frá Reiðarafelagnum vóru rættuliga víðfevnd og ósmæðin. Kravt varð, at oljan skuldi verða felagsútreiðsla í øllum sáttmálum. Fiskireiðskapur skuldi eisini vera loyvdur frádráttur hjá línuskipum. Í nøkrum førum skuldu býtisprosentið lækka. Eisini skuldi ein skipan setast í verk fyri allar skipabólkar, har býtisprosentini lækkaðu tá manningartalið lækkaði. Eisini vóru krøv um, at allir eykapartar skuldu regulerast niðureftir.

Okkara sáttmáli gongur út 1. januar. Reiðarafelagið heldur framvegis fast við, at oljan skal við í allar sáttmálarnar, men nú eru teir sinnaðir at tosa um nýggj býtisprosent, sum kompensation fyri oljuna. Kravið um lækkandi býti við minni manning stendur við. FSN heldur framvegis fast við øll síni krøv.

Reiðararnir grundgeva fyri hesum broytingum, við støði í hækkandi oljuprísum og einari samanteljing av øllum roknskapum hjá føroyskum reiðaríum. Hendan vísir eina sera dapra mynd av fíggjarligu gongdini hjá okkara heimaflota.

Sáttmálin hjá Fiskimannafelagnum gekk út 1. desember. Semingsmaðurin er komin uppí samráðingarnar hjá teimum. FF hevur avvíst at fáa oljuna uppí sáttmálan, men hevur givið eina tilsøgn um, at lækka býtið hjá lemmatrolarum við 1-2% í eitt ár. Hesum hava reiðararnir havnað.

## FARMASKIP

Sáttmálin við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip er uppsagdur til at fara úr gildi, 01-03-11. Dagføringar eru neyðugar á fleiri økjum, kanska serliga fyri frálandaskipini. Nógvir av teimum sum eru við hesum skipum, hava fyrr starvast í Danmark ella Noregi. Hesir hava somu vónir til sáttmálan, sum teir donsku og norsku. FSN hevur sett sær fyri, at okkara sáttmálar skulu vera á sama støði, sum okkara grannalond. Sjálvur lønarspurningurin er nokk tann torførasti parturin av hesum málsetningi.

Lønarlagið er sum heild eini 20% lægri hjá okkum. Fyri smærru handilsskipini er munurin nokk ikki


Eyðstein Djurhuus


Regin Nónstein


Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni


Spurningur frá fundarluttakara

so stórur. Smáu lønarhækkingarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum gera munin størri og størri fyri hvørt ár. Í Noregi hækka allar hýrur í ár við í minsta lagi 3,5%. Flestu reiðarí gjalda meir enn sáttmálalønina. Tey síggja sjálvi, at hetta er neyðugt fyri at halda uppá fólkið.

Nakað av óvissu hevur verið um eftirlønir undir FAS. Hesar geva ikki rætt til frádrátt í skattskyldugu inntøkuni. Tí hava hesar eftirlønir verið goldnar av skattaðum peningi. Útgjaldið verður sostatt skattafrítt. Eftir ætlan skal komandi pensjónsreformurin viðfara FAS pensjónir á sama hátt, sum onnur inngjøld. Vónandi verður hetta problem loyst, tá reformurin kemur í gildi 01-01-12.

## SÁTTMÁLAR VIÐ TAÐ ALMENNA

Sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið (FMR) og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) eru uppsagdir til at fara úr gildið 1. oktober 2010. Av tí at samráðingarnar við tey stóru feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum hava drigið út, eru okkara samráðingar eisini seinkaðar. Lønarkarmurin er hesaferð bert 1,0 % við einum eitt ára sáttmála. Í roynd og veru eru lønarsamráðingarnar bert útsettar í eitt ár.

FSN hevur gjørt semju fyri Magnus Heinason, við nevndu lønarhækkan, reiðarí skal gjalda fyri heilsukanning av sjófólki. Sjálvt um vit kundu fingið 1,25 % um øll hækkingin fór uppá eftirlønina, so valdu vit heldur, at leggja hesa lítlu hækking á sjálva lønina. Fleiri avgjalds- og príshækkingar eru ávegis. Tí var hildið at hækkingin gagnar limunum best soleiðis. Lønarhækkingarnar næsta ár fara, at liggja um 2,75 %, tá verður rúmd fyri at hækka eftirlønirnar eisini.

Samráðingarnar fyri Strandferðsluna ganga ikki so lætt. Nógvir limir eru sera misnøgdir við at SL hevur sent teimum nýggj setanarbrøv við niðursettari arbeiðstíð. FSN hevur kravt at allir limir okkara skulu sum útgangsstøði vera settir á fulla tíð. Tó eru vit sinnaðir at gera seravtalu fyri tey skip, sum hava sera lítla sigling. Somuleiðis fyri farleiðir sum hava so nógvar tímar, at ikki er nokk við tveimum manningum.

Verandi sáttmáli hevur eina áseting um staðbundna avtalu, um niðursetta arbeiðstíð fyri ávísar farleiðir. SL hevur sagt hesar avtalur upp, men feløgini sum umboða manningarnar hava ikki verið sinnaði, at broyta hesar avtalur longur niðureftir enn tær nú eru. Tí hevur SL nú broytt mannagongd og hava sent øllum nýtt setanarbræv við niðursettari arbeiðstíð.

Hetta er ein felags trupulleiki hjá allari manningini. Nú er avgjørt at Maskinmeistarafelagið og FSN skulu royna at loysa hetta mál í felag við FMR. Samráðingarnar halda áfram umleið 10. januar.

Samráðingar fyri Havnameistarar fara í gongd beint eftir nýggjár, tá talan er um ein eitt ára sáttmála, verður neyvan nógv gjørt burtur úr.

Drúgva ósemjan millum FSN og FMR, um avtaluna hjá tænastumonnunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, er framvegis ikki loyst. Ósemjan snýr seg um eina lønarhækkan í 2003, sum limir okkara bert fingu partvíst. Talan eru 2,5 %, sum FSN hevur kravt fyri alt hetta tíðarskeiðið. FMR hevur í langa tíð avvíst, at vit hava nakað krav yvirhøvur. Men nú eru teir sinnaðir, at lata hesa hækking frá 2007 og frameftir. FSN hevur havna hesum tilboðið, ósemjan hevur forða fyri, at avtala okkara er endurnýggja øll hesi ár.

FSN hevur í fleiri førum heitt á FMR, at leggja málið fyri Løgtingið sambært ásetingunum í Tænastumannalógini. Málið verður nú gjørt klárt, at kæra til Umboðsmannin.

## GJALD FYRI HEILSUVÁTTAN, TRYGDARSKEIÐ, OG VINNUBRØV

Tá samfelagið hevur álagt øllum sjómonnum at hava læknakanning, trygdarskeið, vinnubrøv og mangt annað, so er ikki meir enn rímiligt, at hesi annað hvørt eru ókeypis, ella fáast fyri eina rímiliga upphædd. Hetta eru krøv, sum mugu uppfyllast fyri yvirhøvur at sleppa til skips. Kravið um 5 ára endurnýggjan av trygdarskeiði, er eitt serføroyskt krav. Tá landið setur krøv, sum eru strangari enn altjóða krøvini, má landið sjálvandi eisini gjalda sín part.

FSN kann sjálvandi tvinga reiðararnar at gjalda fyri alt hetta, men tað kann sjálvandi bert verða fyri teir, sum eru í starvi. Henda gongd fer uttan iva, at minka um áhugan hjá ungdóminum, at royna sjólívið.

## TILFEINGISGJALD

Fleiri røddir eru frammi, sum mæla til at áleggja skipunum eitt gjald fyri fiskirættindi. Síðani kemur spurningurin fram, um hesi skulu verða loyvd felagsútreiðsla ella ikki. Higartil hava manningarfeløgini hildið sera fast við, at keyp og søla av rættindum er óviðkomandi fyri manningina. Eitt er tó greitt, at vera tilfeingisgjøld áløgd, so kemur hetta á ein ella annan hátt, at ávirka fiskipartin.

FSN tekur undir við tiltøkum, sum kunnu minka um spekulatión við fiskiloyvum. Um ein fiskidagamarknaður og tilfeingisgjøld eru egnaði til hetta, er torført at meta um. Meginreglan eigur altíð at vera, at tann sum virkar í fiskivinnuni, eigur at fáa møguleikan at eiga vinnutólini.

## FISKAVIRKIR Í KREPPU

Í roynd og veru eru føroysku fiskavirkini ongantíð komin burtur úr kreppuni í nítiárunum. Tað eru bert einstøk virki, sum hava fingið lønandi rakstur í framleiðsluna. Tá framleiðarin hevur trupulleikar, rakar hetta eisini fiskimannin. Føroya Løgmaður hevur alment sagt, at hann ikki trýr uppá, at verandi framleiðsluskipan nakrantíð fer at løna seg.

Tíverri bendir alt á, at hann fær rætt í sínum forsøgnum. Komandi tíðin kemur at blíva eitt vegamót á hesum øki. Støða skal takast til, um



Erlandur M. Abrahamsen



Dan Ingi Andreasen

framleiðsla umborð er ein gongd leið. Hetta kundi verið rætta høvi, at endurnýggja okkara heimaflota. Samstundis kundu vit dagført setanar- og lønarviðurskiftini hjá okkara fiskimonnum. Um rætt verður borið at, kann okkurt gott spyrjast burturúr hesa torføru støðu.

## MAKRELSTRÍÐIÐ

FSN tekur undir við teimum tiltøkum, sum tryggja okkara rímiliga part av tí fiski, sum er í okkara havøki. Tá vit nú hava ásett okkum okkara egnu makrelkvotu, ber ikki til at bakka fyri trýsti frá okkara grannalondum. Um vit bakka nú, so missa vit alt trúvirði og verða hildin fyri spott víða um lond. Sjálvt um vit kunnu missa aðrar fiskiveiðuavtalur, so má rætturin at fiska í egnum havøki telja uppaftur meira. Umráðandi er, at vit ikki eru teir fyrstu at upptraðka hesa konflikt. Vit mugu ikki leypa framav, sjálvt um ES og Noreg hava hug, at vísa sína styrki.

## HVØR SKAL MANNA FISKISKIPINI

Arbeiðs- og uppihaldsloyvi krevst til fiskimenn, sum sigla við føroyskum skipum. Tó er hetta ikki galdandi, um skipið ikki kemur regluliga í føroyska havn. Skip, sum fiska og avreiða í Kanada og Kyrrahavinum, koma ikki undir hesa áseting. Nú í summar komu skip við kinesiskari manning at veiða og innhandla makrel í føroyskum sjógvi. Danskir myndugleikar, ið varða av hesum øki, komu fram til, at hesir sjómenn ikki vóru fevndir av kravi um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Allir útlendskir fiskimenn við føroyskum skipum í føroyskum sjógvi, hava higartil skula havt hesi loyvi. So her er talan um munandi broytta umsiting av einum sera týðandi máli. Føroyskir myndugleikar siga seg einki kunna gera við hetta.

Longu nú hevur eitt línuskip eisini uppdagað henda góða fidusin, og hevur fingið sær manning av Filipsoyggjunum. Eftir ætlan skal veiðan uppskipast uttanfyri Føroyar, fyri síðani at vera flutt higar við farmaskipi til sølu og framleiðslu. Sanniliga verður nógv sett í verk, fyri at stýra uttan um reglarnar.

Manningarfeløgini duga væl at síggja vandan í hesi gongd. Vandi er fyri, at øll skipaði sáttmálaviðurskifti fara fyri bakka, um hetta óskil ikki verður steðgað. Vit hava fingið tilsøgn frá Anniku Olsen, innlendismálaráðharra, um at uppstrammingar verða gjørdar í útlendingakunngerðini. Endamálið er, at hetta skal ikki kunna bera til í framtíðini. Útlendskir fiskimenn skulu virka undir somu treytum, sum onnur útlendsk arbeiðsmegi. Feløgini eru greið yvir, at sterkar kreftir arbeiða fyri, at alt skal vera fullkomiliga frítt á hesum øki.

## FAROESE MARITIME UNIONS

Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið, hava stovnað Faroese Maritime Unions (FMU). Endamálið er at gera kollektivar sáttmálar, fyri útlendskar sjómenn við skipum í FAS skipanini. Sáttmálar eru gjørdir fyri svenskar yvirmenn hjá reiðaríunum Fure Tank og MMT. Samráðingar eru í gongd, um sáttmála fyri sjómenn av Filipsoyggjunum. Vinnuhúsið stendur fyri hesum samráðingum og FMU verður sáttmálapartur í hesum sáttmála.

ITF leggur upp til, at fakfeløg úr heimlandinum hjá skipinum og fakfeløg úr heimlandinum hjá sjómanninum, í felag gera kollektivan sáttmála. ITF krevur, at hesir sáttmálar ikki eru verri enn sáttmálarnir hjá International Bargain Forum. Hesir verða nevndir, „IBF avtalur“.

Avtala er gjørd við útlendsk reiðarí, um at gjalda eitt avgjald til FMU, fyri hesar sáttmálar. Hetta er heilt vanligt í okkara grannalondum.



Nevndarborði



Fundarluttakarar

## TRYGD Á SJÓNUM

Nú meir enn eitt á er farið, síðan syrgiligu vanlukkuna umborð á Polarhav, er støðan óbroytt innan okkara tyrlutilbúgving. Okkara einasta bjargingartyrla hevur aftur í vetur staðið sundurskrúvað til eftirlit. Í ólavsøkurøðu løgmans varð annars lovað, at vit innan heilt stutta tíð, altíð skuldu hava minst eina bjargingartyrlu tøka. FSN kann bert staðfesta, at langt kann vera millum orð og gerðir.

Skipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum hava aftur í ár ligið við bryggju í longri tíð, vegna væntandi pening til olju. Tó verður sagt, at skipini kunnu rykkja út, um tað gerst neyðugt. Henda afturvendandi støða, er als



ikki haldbar. Tað eru fleiri av limum okkara, sum ivast stórliga í hvussu seriøsur hesin stovnur er.

## SAMSTARV UTTANLANDS

Norðulendska Navigatørkongressin hevur havt tríggjar fundir í ár. 100 ára føðingardagurin hjá Kongressini varð hildin í Stockholm, í februar. Ein bóklingur varð útgivin í samband við dagin. Til 75 ára dagin, kom søgan hjá Kongressini út í bók. Hesiferð varð tí sett fokus á núverandi virksemið hjá norðurlendsku navigatørfeløgunum.

Í sambandi við IMO og IFSMA fundirnar í Manilla í juni mánað, helt kongressin ein fund. Ein arbeiðsætlan var løgd fyri nýsetta samskiparin hjá Kongressini. Sjó- og Trygdarseminar var hildið í september í Lahti (Finnland). Tommy Petersen stjóri umboðaði Skipaeftirlitið.

Fyri fyrstu ferð hevur FSN verið við til aðalfundin hjá Altjóða Skipsførarafelagsskapinum IFSMA. Nú FAS skipanin veksur so skjótt, kemur hetta at seta størri krøv til at hava góð sambond við sjómannafelagsskapir úti í heimi. Eftir ætlan skal FMU, í størri mun átaka sær hesa uppgávu í framtíðini.

Samstarvið við Søfartens Ledere hevur virkað væl. Limir hjá okkum hava fingið hjáp í Danmark og teirra limir hava fingið hjálp frá okkum. Limafundir hjá Søfartens Ledere eru hildnir hjá FSN.

## FAS

Tað er framvegis stórur áhugi fyri, at skráseta skip í FAS. Svensk skip flýggja undan einari skráseting, sum ikki er kappingarfør á skattaøkinum. Teirra skipan hevur ikki tonsaskatt, men vanligan felagsskatt til reiðaríini.

Norsk reiðarí flyta síni skip til FAS, tí soleiðis kunnu tey partvíst sleppa undan tí høga norska lønarlagnum, men samstundis varðveita rættin at sigla í strandasigling í Noregi. Skip undir FAS hava rætt til kabotagusigling í Noregi. Henda rætt hava vit, tí vit hava verið í ríkisfelagsskapi við Noregi fyri mongum árum síðan.

Føroyska flaggið er framvegis á gráa listanum, „Paris MOU". Men vit hava ongantíð verið so nær hvíta listanum sum nú. Tað er sera umráðandi, at ongi føroysk skip verða afturhildin við Port State Control. Tíverri er tað so, at tá okkara skip verða afturhildin kemst hetta ofta av líkasælu innan pappírsarbeiði umborð. Flestu skip hava ongantíð fingið nakra átalu við hesi kontrol, men onnur eru, sum eru afturhildin meir enn tí einu ferðina.

Í summar og aftur nú í heyst hava tíðindi gingið um, at norsk og svensk sjómannafeløg hava kært FAS til ITF. Tey hava havt eitt ynski um, at føroyska skipaskráin kemur á listan yvir hentleikafløgg hjá ITF. Á henda hátt kunnu tey krevja at varðveita samráðingarrætt, sjálvt um skipini ikki longur eru í teirra skipaskrá.

Føroysku manningarfeløgini hava fingið skrivliga váttan frá ITF, at eingin slík kæra verður viðgjørd, uttan at føroysku feløgini verða hoyrd fyrst. Vit vilja gera okkara ýtasta fyri, at FAS ikki verður brúkt til sosiala dumping av nøkrum slagi.

FAS skipanin kann geva okkum eitt meiri virkið reiðarí-shipping umhvørvi í Føroyum. Um rætt verður borið at, so kann hetta geva okkum nógvar spennandi vinnumøguleikar bæði á sjógvi og landi.





## MIÐ OG MAGN

Áttanda útgávan av limablaði okkara kemur út beint eftir nýggjár. Vit fáa sum heild positivar afturmeldingar uppá blaðið. Onnur – enn limirnir, hava eisini áhugað fyri Mið og Magn. Maskinmeistarafelagið yvirtekur blaðstjóra uppgávuna í komandi árið. Samstarvið millum feløgini hevur verið fyrimyndarligt.

Fyriskipan og tilrættaleggjan er ein týðandi partur av blaðarbeiðinum. So hvørt sum vit fáa fleiri royndir, gerst uppgávan lættari. Tað er sera umráðandi, at limirnir siga okkum, hvat teir vænta av limablaðnum.

## ÚTBÚGVING

Tað er stórur áhugi fyri bæði skipara- og skipsføraraútbúgvingini. Ì okkara grannalondum verður nógv gjørt fyri, at økja um áhugan hjá ungdóminum fyri hesi yrkisleið. Her hava vit ein fyrimun fram um grannalondini. Umráðandi er, at vit brúka hendan fyrimunin rætt og útbúgva øll tey, sum hava hug til sjólívið. Forsagnirnar siga, at stórur mangul verður uppá navigatørar komandi árini. Alheims búskaparkreppan hevur minkað nakað um sjóflutningin, men gongdin er um at venda nú. Í India og Filipsoyggjunum fara í hesum árum fleiri skipsyvirmenn av arbeiðsmarknaðinum, enn tað verða útbúgvin. Hetta er ein av orsøkunum til, at stórur eftirspurningur verður eftir navigatørum í komandi árum.

Mentamálaráðið hevur umsíðir avgjørt at uppstiga skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar á batchelor støði. FSN hevur tikið undir við hesi broyting. Tað er ein misskiljing, tá sagt verður, at nú skulu allir sjómenn verða akademikarar. Hendan uppstigingin er alneyðug, um okkara ungu skipsførarar skulu verða kappingarførir í framtíðini. Í okkara parti fara vit ongantíð at kunna kappast við






## Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umbyggja og umvæla skip er okkara avbjóðing. Men **MEST** er eisini so nógv annað.



**Vit bjóða m.a.**

- Tænastur innan stál, el, hydraulikk, timbur og máling
- Landsins størstu eykalutagoymslu
- Nýmótans smiðju í nýggjum umhvørvi
- Teldustýrdar skerimaskinur
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)

MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo


láglønarlond uttan so, at okkara sjófólk hevur fleiri og betri førleikar at bjóða fram.

Nú hægru maritimu útbúgvingarnar skulu uppstigast, er avgerð tikin um at flyta tær lægru útbúgvingarnar til Klaksvíkar. FSN tekur ikki støðu til, hvar skúlarnir skulu vera í landinum. Tað einasta vit hava áhuga í, er, at fakliga støðið er nóg høgt. Nógv teknisk útgerð er neyðug til hesar skúlar. Tá tað longu nú gongst illa at halda ein skúla dagførdan við útgerð, so vænta vit ikki, at hetta verður lættari við tveimum maritimum deplum.

### FAKFELAG Í FRAMTÍÐINI

Sjálvt um støðan í samfelagnum tykist hóttandi, so eru limagjaldsinntøkurnar hækkaðar, serlig frá fiskiskipunum er munandi meira komið inn í ár. Hesar hava annars verið fyri stórum minkingum seinastu tvey árini. Tað eru nú færri størv í fiskiflotanum, men inntøkan hjá teimum, sum eru eftir er batnað.

Limatalið í frálandavinnuni økist spakuliga, innan farmaskipini er limatali minka nakað, men hetta tal fer allarhelst at økjast aftur. Væl av føroyskum navigatørum eru settir í starv seinastu tíðina. Hetta er við skipum, sum júst nú eru skrásett í FAS.

Krakkið hjá Eik Banka rakar eisini FSN, vit eru tíverri noyddir at staðfesta at okkara partapeningur er mistur. Nevndin avgjørdi at gera hesa íløgu, tí vit mettu, at børskrásett feløg ikki fóru á húsagang frá degi til dags. Vit í FSN eru nokk ikki teir einastu, sum fóru skeivir í hesum.

Tað er sera umráðandi at FSN heldur á við miðvísa arbeiðinum at menna okkum til eitt nýmótans og viðkomandi fakfelag. Ein alsamt størri uppgáva hjá felagnum er at umboða okkara vinnugrein í almenna orðaskiftinum. Mong fakfeløg hava sum málsetning, at gerast meira sjónlig í almenna rúminum. FSN heldur seg ikki hava hendan trupulleika, vit vilja arbeiða fram ímóti, at felagið gerst ein vitanardepil har limirnir og onnur kunnu fáa greitt svar uppá allar viðkomandi spurningar.

Felagið hevur sett sær fyri, at gera munandi ábøtur á okkara málsviðgerð. Fleiri limir hava upplivað, at vit til tíðir hava torført við at svara uppá hvussu stendur til við teirra máli. Hesi mál kunnu verða sera drúgv og fleiri aðrir partar kunnu vera uppi í málsviðgerðini.

Ein góð góðskuskipan innan málsgongdina, kann gagna okkum her og nú. Men kann eisini forða fyri, at felagið gerst sera sárbært, tá starvsfólk brádliga fara úr starvi.

Nú nógv stendur á við samráðingum, er sera umráðandi, at vit fáa uppbakning frá limunum, so vit kunnu røkka einum góðum úrslitið.

At enda skal eg takka øllum fyri góðan stuðul, og ynskja øllum eitt gott nýggjár og Harrans signing í komandi ári.








**Útbúgving:** Aspirantútbúgving hjá Mærsk, maskinmeistari 1981 og víðkaða prógvið 1988 her í Tórshavn. Eftirútbúgving sum kølimontør 2003

**Starv:** Kølimontørur og tekniskur ábyrgdari hjá Kelvin sp/f.

**Hjúnafelagi:** Jóna Egholm Jacobsen, námsfrøðingur.

**Børn:** Tríggjar gentur frá 30 til 19, og tvey deilig abbabørn.

**Besta bók:** Har eru so nógvar, og hava tær tað til felags, at tingini vera sett uppá spíssin, til dømis eru Sjøval og Wahlø krimibøkurnar, George Orwell við Animal Farm og 1984 og William Heinesen. Men ikki má gloymast, allar bøkurnar hjá Jørn Riel, serliga tær i kallast „Fortællinger hvoraf man får et smukt ansigt"

**Fyrstu ferð til skips:** Marts 1976 við M/S „Marchen Mærsk", mynstrað var í Kuwait. Hon hevði fart millum Persaragolfin, Japan og alt har í millum.

**Longsti túrur til skips:** 9 mánaðir við omanfyri nevnda.

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:** Ein breið vifta, semibingjuskip, supertankara, gasskip, frystiskip, kemikaliuskip, seyðaskip og heavy-lift. Serliga seyðaskipini vóru eitt upplivilsi, dangur av fúlastu skuffu, men ein lærdi sera nógv um, hvat skuldi til fyri at skipini skuldu koma vegin fram við hjálp frá, hvat var fyri hondini.

**Størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag:** Menningin av tekniskari útgerð, ger at marginalarnir eru blivnir sera smalir. Tvs. týdningurin av at týða og skilja tey tekn, sum útgerðin gevur fyri, hvussu hon hevur tað, skal henda nógv skjótari enn fyri 30 árum síðani, soleiðis at havarí kann fyribyrgjast. At samanbera við mínar egnu royndir. Eitt skip bygt í 60'unum kravdi eitt gott handverk fyri at koma fram, har var heldur ikki so nógvur automatikkur til yvirvaking og líknandi. Meðan eitt skip bygt innanfyri tey síðstu 15 árini krevur, at ein hevur gott skil fyri automatikki sum er alneyðug orsaka av smølum marginalum, tí so nógv information er neyðug um standin av útgerðini. Og orsaka av teim minkandi manningum er maskinmeistarin eftirhondini at samanbera við eina tíggjuarmaðan høgguslok sum arbeiðir 24/7 við vitan og royndir hjá fleiri monnum. Hetta ger at útbúgvingin má lyftast upp tá kemur til bókliga vitan samstundis sum eitt handverk innan fleiri greinar skal lærast. Hetta hevur við sær, at maskinmeistaraútbúgvingin nokk er ein tann longsta og rættiliga krevjandi útbúgvingin her á landi. Men orsaka av spaklyndi hjá maskinmeistarum er hetta ikki komi fram millum manna.

Maskinmeistaraútbúgvingin er eisini ein góður grundarsteinur, tá tað er neyðugt við serfrøði innan tær nógvu greinar, sum maskinmeistarar dekka yvir. Til dømis innan mítt egna økið sum er køling. Meira enn 5 hvør kilowatt-tími framleiddur av elverkum runt í verðini verður nýttur til køling av onkrum slag, so tað er av størsta týdningi, at kølianlegg koyra so orkuoptimalt sum gjørligt.

**Frítíðarítriv:** Tað skiftur eitt sindur: Lesa, foto, túrar men ikki at gloyma mítt fak, at halda meg ajour í tí og royna nýggjar vegir.

**Bilur:** Ein bláur Suzuki Wagon-R frá 2001. Hann var bíligur, brúkar lítið, kostar lítið í viðlíkahald og dekk, er lættur at koma inn í og út aftur og ikki at gloyma null off-dagar

**Telda:** Teldur og eg, vit eru sum reyðar kýr. Hon hevur nógv at bjóða sum amboð í tí dagliga arbeiðinum, men av eina ella aðrari orsøk, helst tí, at teldur ikki er ein partur av mínum barnaárum og ungdómi, vit koma ikki til sættis. Annars havi eg eina Dell farteldu.

**Besti sangur:** Fagra blóma hjá Poul F

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:** At arbeiði riggar, at teldan uppførir seg ordiligt, ein hugnaløta sum kemur óvæntað.

**Hvat kann øsa teg:** Ræturin hjá samfelagnum til at fara út um alt mark og vanliga virðing fyri borgarum í hesum landið, fyri at verja okkum ímóti rúsevnum og terrori og hvat annars mátti veri óynskt. Hesi fólk sum hálova hesar rørslur áttu at lisið „1984" eftir George Orwell og „Fahrenheit 451" eftir Ray Bradbury. Big brother er ikki fremjandi fyri frælsi.

# TÍÐINDI FRÁ SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGNUM

## BROT ÚR DAGBÓKINI

**08-10-10 Fuglajørður**
Fundur við P/F Sandgrevstur um eitt uppsagnarmál

**11-10-10 FSN**
Nevndarfundur í Maritimum Forum

**18-10-10 Portugálið**
Vinnumálaráðið skipar fyri hoyringsfundi um hvussu Maritime Labour Convention sáttmálin skal innførast í føroyska lóggávu.

**19-10-10 FSN**
Nevndarfundur hjá FSN, sáttmálakrøvini hjá okkum verða viðgjørd

**20-10-10 Fíggjarmálaráðið**
Sáttmálasamráðingar

**25-10-10 Fiskimálaráðið**
Fundur um lógaruppskot um inntøkutrygdina

**27-10-10 Runavík**
Faroe Expo skipar fyri fyrilestrum um avbjóðingar fiskivinnuni.

**01-11-10 Vinnuháskúlin**
Minningarhald yvir teir sum eru farnir á sjónum

**01-11-10 Sjó-og Vektabúðin**
Øll vinnan hevur fund við Innlendismálaráðharran um neyðugar broytingar í Útlendingakunngerðini.

**02-11-10 Gongin**
FSN og Reiðarafelagið leggja sáttmálakrøvini fram

**04-11-10 Jarðfeingi**
Maritimt Forum: fyrireiking av ráðstevnu

**05-10-10 FSN**
Samrøða við yvirmenn á Smyril um sáttmálasamráðingarnar

**08-11-10 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð kungerð um at djúpvatnsfiskasløg og hýsa ikki skula verða fevnd av avmarking í avreiðing uttanlands

**08-11-10 Portugálið**
Sjóvinnuráðið viðgerð kæru frá reiðara um manningaráseta hjá einum farmaskipi. Reiðarin kravdi, at skipi bert skuldi hava ein stýrimann. Kærarin fekk ikki viðhald.

**11-11-10 Løgtingið**
Vinnunevndin vil hoyra okkara áskoðan um lógarbroytingar viðvíkjandi inntøkutrygdini og gjaldi fyri heilsukanning av sjófólki.

**12-11-10 Norðurlandahúsið**
Maritimt Forum skipar fyri ráðstevnu um vøkstur og nýggjar vinnumøguleikar í FAS skipanini. Nógv fólk møtti til ráðsevnuna, einasti politikkarin, sum vísti hesum tiltaki áhuga var Karsten Hansen

**17-11-10 Fíggjarmálaráðið**
Framhald av sáttmálasamráðingum

**18-11-10 Norðurlandahúsið**
Nordisk Ministerråd skipar fyri ráðstevnu um, hvørjar forðingar er fyri, at arbeiðsmegi frítt kann ferðast millum Norðanlond.

**19-11-10 Havnar Arbeiðskvinnufelag**
Fagfeløg hittast, at umrøða ætlaðar broytingar hjá Fasta Gerðarættinum

**25-11-10 MF**
FMU hittir umboð fyri reiðari Switser, sum skal skráseta fleiri sleipibátar í FAS

**06-12-10 Mentamálaráðið**
Maritima útbúgvingarráðið fær kunning frá Helenu Dam á Neystabø um ætlaðar broytingar innan útbúgving av sjófólki

**09-12-10 Vinnuháskúlin**
Skiparanæmingar fáa kunning um fiskiskipasáttmálan og onnum arbeiðsmarknaðarviðurskifti

**10-12-10 Runavík**
Fundur fyri manningarnar á skipunum hjá Faroe Seafood

**14-12-10 FSN og Reiðarafelagið**
Nevndarfundur og sáttmálasamráðingar

**17-12-10 Vinnuháskúlin**
Prógvhandan

**20-12-10 Fiskimálaráðið**
Fundur í fiskivinnuráðnum og í arbeiðsbólkinum sum viðger inntøkutrygdini. Reiðarafelagið heldur seg ikki fáa nóg góða umboðan í styri fyri Trygdargrunni Fiskivinnunar.

**20-12-10 MF**
Samráðingarfundur millum manningarfeløgini og Reiðarafelagi. Semingstovnurin var við og kunnaði seg um samráðingarnar

**22-12-10 Fíggjarmálaráðið**
Semja gjørd fyri Magnus Heinason. Avtala varð at víðari samráðingar fyri SSL verða saman við MF

**28-12-10 Norðurlandahúsið**
Aðalfundur

**03-01-11 Gongin**
Samráðingar við Reiðarafelagið

**05-01-11 Gongin**
Framhald av sáttmálasamráðingum

# GÓÐ UPPMØTING TIL AÐALFUNDIN

Vit í FSN fegnast um, at uppmøtingin hesaferð er ein tann besta, vit vita um. Spenta støðan í sáttmálasamráðingunum kann vera ein orsøk. Nógv nýggj andlit vóru at síggja. Tað eru limir, sum vanliga ikki koma til aðalfundin.

Til nevndarvalið hevði Heðin M Isaksen boða frá, at hann ikki ynskti at halda fram í nevndini. Í hansara stað varð valdur Leivur Christiansen úr Miðvági. Vit vilja takka Heðini, fyri tíðina hann hevur verið í nevndini. Leivur, sum er skipari á Teistanum, hevur verið við í nevndini fyrr. Vit fegnast um, at vit aftur nú hava ein nevndarlim frá Strandferðsluni.

Í rokniskapi felagsins hevur í ár verið neyðugt, at avskriva øll partabrøvini sum FSN átti í EIK Banka. Samstundis høvdu vit inntøkufort okkara part av ognunum hjá gomlu samlagstryggingini hjá manningarfeløgunum. Samlaða úrslitið á rokniskapinum var eitt avlop á 238 tús.

Eftir fundin helt stjórin á Havstovuni Eilif Gaard ein áhugaverdan fyrilestur, sum hann kallaði Fiskiskapur útlit og samstarv. Hann viðgjørdi rættuliga neyvt útlitini fyri allar teir týdningamiklastu fiskastovnarnar.

Undir orðaskiftinum eftir fyrilesturin, varð umrøtt var, hvussu vit sum frægast skipa okkara fiskiskap, nú vit hava vísindalig prógv fyri, at tað eru umstøðurnar í náttúruni, sum størsta gera munin í tilgongd og vøksturi hjá fiskastovnunum.

Eilif meinti, at veiðiorka og fiskidagatal mátti ásetast við varsemi, júst tí at, fortreytirnar í náttúruni kunnu vera so ymiskar. Niðurstøða hansara varð, at soleiðis kunnu vit fáa ein javnari fiskiskap.

Fleiri av fundarluttakarunum hildu, at allur makrelurin, sum er komin inn á okkara grunnar, hevur tikið føðigrundarlagið undan øllum øðrum fiski á grunninum.

Makrelurin varð eisini lagdur undir at hava etið alt ynglið, sum skuldi verið komið undan okkara botnfiskastovnum. Eilif hevði undir fyri lestrinum sagt, at nærum einki yngul var at finna undir yngulkanningunum í summar. Hann boðaði frá at næsta summar verður gjørd ein stór kanning, sum skal staðfesta hvat makrelurin etur, tá hann er í føroyskum øki.

# FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Trygvi Meinhardson | 16. Juni 1931 | 80 ár |
| Hjalmar Lamhauge | 24. Januar 1941 | 70 ár |
| Óli Petersen | 24. Januar 1941 | 70 ár |
| Anfinn Huusgaard | 12. Mars 1941 | 70 ár |
| Petur Eliasen | 11. Januar 1951 | 60 ár |
| Jens Suni Henriksen | 27. Februar 1951 | 60 ár |
| Rúni Hentze | 22. Mars 1951 | 60 ár |
| Atli á Plógv | 9. Apríl 1951 | 60 ár |
| Haldor M. Haraldsen | 10. Apríl 1951 | 60 ár |
| Eyðfinn á Reynatrøð | 4. Mai 1951 | 60 ár |
| Kári millum Garðarnar | 5. Mai 1951 | 60 ár |
| John Hansen | 4. Juni 1951 | 60 ár |
| John Andru Hansen | 4. Juni 1951 | 60 ár |
| Ellind Danielsen | 12. Juni 1951 | 60 ár |
| Jens Kristian Hansen | 2. Januar 1961 | 50 ár |
| Elias Johannesen | 23. Januar 1961 | 50 ár |
| Óli J. Niclasen | 19. Februar 1961 | 50 ár |
| Leon Sólheyg | 19. Februar 1961 | 50 ár |
| Mortan Aksel Mortensen | 4. Mars 1961 | 50 ár |
| Dánjal Jarnskorð | 11. Mars 1961 | 50 ár |
| Mortan Bjartalíð | 22. Mars 1961 | 50 ár |
| Høgni Samuelsen | 28. Mars 1961 | 50 ár |
| Erlendur Simonsen | 4. Apríl 1961 | 50 ár |
| Arvid Nilssen | 12. Mai 1961 | 50 ár |
| Johannes Joensen | 24. Juni 1961 | 50 ár |
| Birgir Andreassen | 12. Januar 1971 | 40 ár |
| Stígur Rasmussen | 19. Januar 1971 | 40 ár |
| Frits Heðin Jacobsen | 11. Februar 1971 | 40 ár |
| Ian Kruse Thomsen | 11. Februar 1971 | 40 ár |
| Óli Sørensen | 15. Februar 1971 | 40 ár |
| Hans Helgi Strøm | 14. Mars 1971 | 40 ár |
| Bogi Kallsberg | 5. Apríl 1971 | 40 ár |
| Magnus Jacobsen | 7. Apríl 1971 | 40 ár |
| Jógvan Vilhelm | 14. Apríl 1971 | 40 ár |
| Óli Hans Fróði Olsen | 23. Apríl 1971 | 40 ár |
| Jónsvein Joensen | 1. Mai 1971 | 40 ár |
| Súni Hansen | 5. Juni 1971 | 40 ár |
| Símun P. Dam | 27. Juni 1971 | 40 ár |
| Vilhelm S. Petersen | 27. Juni 1971 | 40 ár |
| Jón Rubeksen | 28. Juni 1971 | 40 ár |

# TÍÐINDI FRÁ MASKINMEISTARAFELAGNUM

## BROT ÚR DAGBÓKINI

**13-10-10: MF**
Óformellur fundur millum MF, FMR og KAF um, hvussu víðari skal farast fram í lønarsamráðingunum.

**15-10-10: MF**
Nevndarfundur. 5 mál á skránni m.a. tíðindaskriv viðv. formanni og komandi samráðingar við FMR og Føroya Reiðarafelag.

**18-10-10: Portugálið, Vinnumálaráðið**
Fundur um broytingar í lóg um sjófólk, trygd á sjónum og manning av skipum.

**19-10-10: Starvsmannafelagið**
Fundur fyri forkvinnur og formenn í fakfeløgunum, sum hava sáttmálar við FMR og KAF. Umrøtt støðuna í sáttmálasamráðingunum.

**22-10-10: MF**
Annar samráðingarfundur, lagt sáttmálakrøvini fram, og fingið útflýggjað krøvini frá FMR og KAF.

**25-10-10: Fiskimálaráðið**
Fundur um uppskot til Trygdargrunn fiskivinnurnar.

**25-10-10: FSN**
Blaðfundur: Mið og Magn**.**

**29-10-10: MF**
3. samráðingarfundur. Tosað varð um Strandfaraskip Landsins, almennari tænastu á landi og SEV, IRF

**29-10-10: MF**
Nevndarfundur. Til umrøðu: Komandi sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag, nú teir hava sagt sáttmálan upp. Inntøkutrygd og útlendskar manningar. FMA og Maskinistútbúgving.

**01-11-10: Vinnuháskúlin og Viðarlundin**.
Minningarhald teirra sjólátnu.

**02-11-10: Føroya Reiðarafelag**
Føroya Reiðarafelag legði fram uppskot um nýggjan sáttmála og gjøgnumgongd.
MF handaði síðani síni krøv.

**03-11-10: MF**
Fundur við Hans J. á Brúgv. Fundur um skeiðs-ætlan á Vinnuháskúlanum og annað.

**04-11-10: MF**
4 samráðingarfundur, tosað varð um Strandfaraskip Landsins, almennari tænastu á landi og SEV / IRF

**08-11-10: Portugálinum**
Fundur í Sjóvinnuráðnum um manningar ásetan.

**09-11-10: Hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
Kunnandi fundur fyri forkvinnu og farmonnum í fakfeløgunum , sum hava sáttmála við FMR og KFA.

**11-11-10: Vinnunevndin**
Fundur í samband við løgtingsmál nr.22/2010: Um inntøkutrygdina.

**12-11-10: MF**
Nevndarfundur: 10 mál á skránni, millum annað sáttmálasamráðingar.

**15-11-10: MF**
Sáttmálasamráðingar millum FMR, KAF og MF
Á hesum fundi ásannaðu partarnir, at tað bar ikki til at fáa semju um nýggjan sáttmála.

**16-11-10: MF**
Fundur við Fakfelagssamstarvið (5 fakfeløg).
Tey vórðu kunnaði um, at MF eftir áheitan frá Snorra fór at útseta sina seming nakað.

**16-11-10: Fíggjarmálaráðið**
Snorri boðaði frá, at hann ikki kundi vera til fleiri semingar í senn.

Partarnir samdust um at hittast aftur 1. desember

**17-11-10: FF**
Fingu kunning saman við FSN, um gongdina í samráðingunum millum FF og Føroya Reiðarafelag.

**18-11-10: FSN**
Blaðfundur: Mið og Magn**.**

**23-11-10: FF**
Fundur millum MF, FSN og FF um avlopið av gomlu samlagstryggingini millum feløgini.

**23-11-10: Starvsmannafelagið**
Fundur millum forkvinnur og formenn í fakfeløgunum, sum hava sáttmálar við FMR og KAF.

**25-11-10: MF**
Fundur við umboð frá SVITER og Nordic Offshore.
Teir upplýstu, at fyrst í komandi ári verða 10 av teirra sleipibátum skrásettir í FAS,

**26-11-10: MF**
Nevndarfundur 7 mál á skránni, millum annað búagrunnurin, samráðingar við FR og fyrireikaðan til fund við Lønardeildina.

**30-11-10: Løgtingið**
Fundur í vinnunevndini um inntøkutrygd fiskimanna.

**01-12-10: MF**
Fundur um val av semingsmonnum, semja var um at gjøgnum ganga krøvini einaferð enn og hyggja upp á tað, sum einki kostar.

**06-12-10: Starvsmannafelagið**
Kunnandi fundur um gongdina og hvussu semjan kom í lag millum FMA og Fakfelagssamstarvið.



**08-12-10: MF**
Sáttmálasamráðingar millum FMR, KAF og MF.

**09-12-10: Runavík**
Manningarfeløgini høvdu fund við manningarnar, sum sigldu við skipinum hjá Faroe Fish 2 í konkurs.
Bústjórin og umboð fyri ALS vóru eisini hjástødd,

**15-12-10: MF**
Sáttmálasamráðingar millum FMR, KAF og MF.

**15-12-10: Faroe-Law**
Fundur millum manningarfeløgini, bústjóran og Faroe Fish 2 í konkurs, sum var sinnað at leiga skipini frá búnum.

**20-12 10: MF**
Kunningarfundur millum nevndirnar í FR, FF, MF, FSN.
Semingsmenninir vóru eisini hjástaddir

## EITT HENDINGARÍKT ÁR

Maskinmeistarafelagið skrivaði 15. desember undir semju við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyri maskinmeistarar í almennari tænastu á landi, við Magnusi Heinason, Fiskiveiðieftirlitinum og hjá SEV.

### SAMRÁÐINGAR

Sum kunnugt, so samráddist fakfelagssamstarvið við 5 fakfeløgum seg fram til ein karm upp á 1 %.

Maskinmeistarafelagið fekk sama tilboð, men valdi tó at leggja alla hækkingina upp á eftirlønina, sum hækkar við 1,25 %. Umframt hetta vórðu onkrar smávegis broytingar og dagføringar gjørdar.

Sáttmálin fyri maskinmeistarar hjá Strandfaraskipum Landsins er ikki endaliga avgreiddur enn.

Vit eru í hesum døgum eisini í samráðingum við Føroya Reiðarafelag. Tað ber ikki til at siga, hvussu hetta fer at enda, men vit kunnu upplýsa, at mótparturin hevur stór krøv um niðurskurðir, sum m. a. umfata nettosáttmálar, lækking av býtisprosentum og lækking av yvirmannahýrum. Vit hava hinvegin ynskt at fáa ásett fastar mánaðarhýrur + reguleringar sambært býtissáttmálum.

*framhald á næstu síðu*

## FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Eyðun Elttør | 23. Mars 1941 | 70 ár |
| Jákup Gunnarstein | 21. Juni 1941 | 70 ár |
| Johan við Neyst | 28. Januar 1951 | 60 ár |
| Birgir Nicodemussen | 18. Mars 1951 | 60 ár |
| Jens Olav Trustrup Jensen | 10. Apríl 1951 | 60 ár |
| Niels Jacob Olsen | 15. Apríl 1951 | 60 ár |
| Dánial Suni Thomsen | 22. Apríl 1951 | 60 ár |
| Gunnar Rubeksen | 22. Apríl 1951 | 60 ár |
| Martin Kjærbo | 23. Apríl 1951 | 60 ár |
| Jósvein Jacobsen | 27. Apríl 1951 | 60 ár |
| Øssur T. Simonsen | 21. Mai 1951 | 60 ár |
| Ásmund Lassen | 24. Mai 1951 | 60 ár |
| Poul Dávur Poulsen | 26. Juni 1951 | 60 ár |
| Narvi Eyðunsson | 26. Juni 1951 | 60 ár |
| Eyðálvur Joensen | 1. Apríl 1961 | 50 ár |
| Sigurd Suni Poulsen | 26. Apríl 1961 | 50 ár |
| Eyðfinn J. Mellemgaard | 19. Juni 1961 | 50 ár |
| Adrian Reinert | 1. Januar 1971 | 40 ár |
| John Høgnesen | 18. Januar 1971 | 40 ár |
| Ólavur Janussarson Østerø | 19. Januar 1971 | 40 ár |
| Snorri Jensen | 31. mars 1971 | 40 ár |

# TÍÐINDI FRÁ MASKINMEISTARAFELAGNUM

*framhald …*

Ásannast má, at tað kann gerast trupult at finna semju, men vit fara at gera okkara besta fyri at tryggja limum okkara best møguligu kor.

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ 70 ÁR

Komandi ár fyllir Maskinmeistarafelagið 70 ár og nevndin hevur tí gjørt av, at skipa fyri veitslu sama dag, sum aðalfundurin verður tann 19. mars 2011.

Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19 og er ókeypis fyri limir við maka. Vit heita á tykkum um at boða frá luttøku við at ringja ella senda okkum teldupost innan 1. mars 2011.

## FORMANSVALIÐ

Til formansvalið sum verður á komandi aðalfundi, hevur verandi formaður Páll Hansen boðað frá, at hann stillar upp aftur og harafturat hevur fyrrverandi formaðurin Finnleif Guttesen boðað frá, at hann eisini stillar upp.

Higartil hevur formansstarvið í Maskinmeistarafelagnum verið framíhjáarbeiði, men nevndin fer at leggja uppskot til lógarbroytingar fram á komandi ársaðalfundi soleiðis, at formaðurin skal vera í føstum løntum starvi.

Um hetta verður samtykt, er ætlanin at komandi formansskeið verður 1 ár og at fyrsti formaðurin í føstum starvi skal veljast á ársaðalfundinum í 2012. Tá verður formansskeiðið 3 ár.

Til nevndarvalið standa Regin Olsen og Ólavur Gunnarsson fyri vali og báðir hava boðað frá, at teir taka við afturvali. Fleiri uppskot til nevndarlimir kunnu setast fram á aðalfundinum.

Maskinmeistarafelagið ynskir limum felagsins og teirra familjum eitt gott nýggjár.






Við ynskjum um eitt eydnusamt nýggjár takkar Norðborg fyri farna árið

# FØROYSKI SKIPSPORTALURIN

## www.skipini.fo

Teir tríggir Kiran, Sverri og Bárður hava megnað at gjørt vart við seg á ein slíkan hátt, at mong hava undrast. Hóast teir eru blaðungir, so hava teir við heimasíðuni Føroyski skipsportalurin www.skipini.fo megna at fáa fólk – í stórun tali – at vitja heimasíðuna regluliga.

Teir eru ídnir og leggja javnan nýtt og forvitnisligt tilfar á Skipsportalin.

Vit hava sett teimum stevnu, og spyrja fyrst, hvat tað er, sum fær tríggjar ungdómar at leggja so nógv tíð og orku í ein portal um skip, fiskiskap og onnur tíðindi, sum er knýtt at havinum.




*Kiran, Sverri og Bárður reka www.skipini.fo*

### ARBEIÐSSAMIR OG MÁLSØKNIR

Sjálvir siga teir seg ikki vera øðrvísi enn flest allir aðrir ungdómar. Men tá vit hava tosað saman eina løtu fáa vit eina aðra mynd: Teir eru arbeiðssamir, málsøknir og liggja sjáldan á teirri latu síðuni.

Sverri er tann yngsti, hann gongur í 10. flokki í Eysturskúlanum. Hann gongur á breytini, sum á Eysturskúlanum hevur fingið navnið Nám X. Kiran er tann elsti, hann er 19. Bárður og Sverri gingu báðir í 9. flokki í Venjingarskúlanum.

Tá vit spyrja, hvussu skipsportalurin kom í lag greiða teir fyrst frá, at teir eru uppvaksnir í sama grannalagi, og hava kent hvønn annan í góð 6 ár, og vinskapurin er hesi árini mentur nógv.

### HUGSKOTIÐ

Hugskotið til Skipsportalin kom rættuliga bráddliga. Vit sótu heima hjá Kiran og prátaðu eitt kvøldi, og koma so spakuliga inná evni „Føroyskir Miðlar". Práti fór ymsar vegir, men so fóru vit at undrast á, at ongin miðil tók sær burturav av skipstíðindum.

Her var okkurt áhugavert. Hetta er okkara størsti vinnuvegur, og fleiri fólk hava áhuga fyri hesum. Og so var tað bara har, tá ið vit fáa eitt hugskot plaga vit altíð, at føra tað út í lívið siga teir tríggir Kiran, Bárður og Sverri.

Teir greiða frá, at teir hava skipa heimasíðuna í fleiri bólkar, soleiðis at allir hava ymsar uppgávur. Sverri umsitur tað tekniska arbeiði, og skrivar tíðindir av og á, Bárður tekur sær av myndasavninum, og Kiran skrivar tíðindir, tekur skipsmyndir og hevur „Størv".

### ENDAMÁLIÐ

Endamálið við heimasíðuni er at hava eina heimasíðu har tað bert verður skrivað um ymiskt, ið hendur í skipsheiminum.

Pengar hava ikki nógv at siga hjá okkum, tað er áhugin í drívir heimasíðuna. Einasta endamálið við pengunum er, at vit skulu hava pengar til økisnavnið, ið skal gjaldast hvørt ár, og ymsar útreiðslur fyri at hava heimasíðuna koyrandi.

Teir tríggir hava allir hvør sítt áhugamál, Bárður umhugsar eitt lív sum teknikari í sjónvarpinum. Sverri hevur stóran áhuga innan heimasíðu tøkni, og hevur ætlanir um at læra til foritara, og Kiran hevur ætlanir sum vinnulívsmaður.


## Skeiðskema 2011



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | jan | feb | mars | april | mai | juni |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA Automatic Radar Plotting Aids | 4 | 8.900 | | 7 | | 26 | | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC General Operator Certificate (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC General Operatør Certificate, renewal of course | 7 | 7.000 | | | | | 2 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC Long Range Certificate | 7 | 8.900 | | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC Long Range Certificate, with Inmarsat | 8 | 9.950 | | | | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers | 5 | 6.800 | 17 | | | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>Transport of dangerous goods in dry cargo ships | 3 | 5.400 | | | | 11 | | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>Supplementary training in medical proficiency | 4 | 7.500 | 17 | | | | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>um prógvið er eldri enn 10 ár<br>Supplementary training in medical proficiency<br>When certificate is older than 10 years | 10 | 12.000 | | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>Course in Elektronic Cart Display Indication System | 4 | 8.900 | 24 | | | | 16 | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>Renewal of maritime training certificate | pr. dag | 1.500 | | | | 4 | | |
| 12 | SSO-skeið<br>Course for Ship Security Officers | 3 | 5.400 | | | | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>Working environment §16-course | 3 | 5.800 | | | | | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið<br>Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>Course as Bolier Tender | 5 | 7.500 | | | | | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Fire Fighting on board Ships | 3 | 5.650 | 03<br>10<br>24 | 14<br>21<br>28 | 01<br>28 | | | |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Refresher Course in Fire Fighting | 1 | 2.900 | 13 | 24 | 31 | | | |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi<br>STCW A-VI/3<br>Advanced Fire fighting | 2 | 4.100 | 06<br>13<br>27 | 03<br>17 | 03 | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>Fire Fighting for Ships Officers | 5 | 9.750 | | | | | | |
| 19 | STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil<br>Advanced Fire fighting for Ships Officers | 5 | 8.650 | | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | 14 | | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking<br>(Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

# MASKINMEISTARAFLOKKUR NÁMSFERÐ Í DANMARK

**Tað er vanligur siður, at elsti maskinmeistaraflokkur á Vinnuháskúlanum skipar fyri eini námsferð. Í heyst valdi maskinmeistaraflokkurin at skipa fyri eini námsferð til Danmarkar. Túrurin var frá 7. til 17. oktober.**

**Næmingarnir hava skrivað áhugaverda ferðafrásøgn um ferðina.**

**Av tí, at frásøgnin hjá næmingunum er so umfatandi hevur MIÐ & MAGN valt at endurgeva nøkur áhugaverd brot úr ferðafrásøgnini:**

– Túrurin gjørdist sera áhugaverdur. Á túrinum vóru vit á ymiskum vitjanum, ið høvdu við okkara arbeiðsøki at gera.

Vit gjørdu eina vitjan hvønn dag uttan mánadagin, tá vit gjørdu tvær. Tey virkir, ið vit vitjaðu lógu frá Keypmannahavn til Aalborg, so tað var nógv ferðing. Vit høvdu lánt ein buss frá Askham Bussar úr Klaksvík og koyrdu sjálvir.

## NORRØNA

Fyri at fáa so nógv burtur úr túrinum sum møguligt, byrjaðu vit longu umborð á Norrønu. Vit fingu eina rundvísing umborð, har 1. meistari vísti okkum runt. Tað vóru tvey punk, ið vit fóru ígjøgnum. Trygdin og arbeiði umborð.

Trygdin byrjar longu við, hvussu Norrøna er uppbygt. Hon er uppdeild í sektiónir. Hon er bygt soleiðis, at hon klárar at sigla víðari, sjálvt um tvær sektiónir eru fullar av sjógvi. Um tað er maskinrúmið, ið er fult, so klárar hon sjálvandi ikki at sigla, men flýtur. Tá man grenjar um Norrønu, so er tað altíð, tí tað rullar so illa, men hetta høvdu teir betrað um við at seta størri stabilisatorar í. Hesir stabilisatorar vóru stórir í vavi fyri at klára alla ta megi, ið teir vera útsettir fyri.

Um mann søkir arbeiði sum maskinmaður her umborð, so kann mann gott lata vera við at fáa sær ein góðan kontórstól frá Skemmuni inn í kontrolrúmið, tí her var ríkiligt at gera. Høvuðs- og hjálpimotorarnir kravdu nógv viðlíkahald. 1. meistari tók soleiðis til, at til tíðir var so nógv at gera, at sjálvt maskinstjórin eisini mátti til arbeiðis.

## LEYGARDAGUR: 9. OKTOBER

Vit leggja at í Hirtshals og koyra allan vegin til Keypmannahavnar. Hetta var ein drúgvur túrur uppá 7 tímar. Til tíðir var tað neyðugt at steðga í M'inum, tá náttúran kallaði.

Avedøre kraftverkið: Mánadagur 11. oktober

Mánamorgunin kl. 10 byrjaði okkara fyrsta vitjan, har vit skuldu vitja Avedøre kraftverkið. Har vóru vit móttiknir á parkeringsplássinum av leirvíkinginum Filip, sum mátti fáa vaktina at loyva okkum inn á økið, og sum eisini skuldi vísa okkum runt á verkinum. Rundvísingin byrjaði við, at vit vóru bodnir inn í eitt fundarhøli, har ið Filip fortaldi okkum um Avedøre kraftverkið og um DONG Energy, sum eigur kraftverkið. DONG Energy má, sum øll onnur, royna at hugsa um grøna orku og er tí farin at fáast við vindmyllur. Teir eru nú eitt av førandi nøvnunum innan uppsetan av vindmyllum, og kraftverkini hjá DONG eru eisini farin at brenna meira av biobrenni sum t.d. hálm og træpillarar, men stórstiparturin er enn kol. Á Avedøre kraftverkinum er 64,6 % av tí, sum verður brent, kol, og 12,8 % biobrenni, restin er so olja, natúrgass og burturkast. Ætlanin er, at tey 64 % skulu vera biobrenni, og at kolið minkar niður á eini 13%. Og tí eru tey nú í holt við at útbyggja sinar goymslur til træ og annað.

Avedøre kraftverkið er eitt av effektivastu kraftverkunum í heiminum. Tað hevur tveir blokkar; blokkur 1 er ein tvørtrekksketil, sum er bygdur í 1990, og blokkur 2 er ein tornketil, bygdur í ár 2001. Samlað klárar kraftverkið at framleiða 825 MW, sum er 30% av elnýtsluni á Sjællandi og veita 200.000 sethúsum fjarhita, sum svarar til 900 MJ.

Á Avedøre kraftverkinum eru 28 maskinmeistarar í driftini, og so eru eisini nakrir, sum eru í teknisku deildini. Maskinmeistararnir takast nógv við tillagan av anlegginum, tað vil siga at teir t.d. fylgja teimum reglum, sum alla tíðina verða gjørdir um útlát og royna nýggjar skipanir, sum menningardeildin kemur við.

Eftir eina sera spennandi framløgu frá Filip sluppu vit ein rundtúr á blokki 2, sum ikki var í drift hendan dagin, tí ein elmotorur til eina pumpu var gingin fyri. Hann vigaði eini 25 tons, so tað tók eina løtu hjá teimum at skifta hann. Rundtúrurin byrjaði við turbinurnar, og haðani fóru vit inn í kontrollrúmið. Síðani sluppu vit at síggja ketilin og alt, sum har til hoyrir; tað var eitt sindur ringt at hava yvirlit yvir, hvar í anlegginum vit vóru, av tí at alt var so ótrúliga stórt og ógvusligt. T.d. kann nevnast, at ein motorur hjá SEV á Sundsverkinum ikki hevði klára at forsýna føðipumpuna á blokki 2, og sum Filip segði undir framløguni, at upplæringartíðin hjá einum maskinmeistara er millum 2 og 6 mánaðir, og aftaná eini 2 ár byrjar mann at hava nøkulunda føling við, hvat tað er, sum gongur fyri seg. Hesin fyrraparturin, vit vóru og vitjaðu kraftverkið, var kanska heldur stuttur til at seta seg inní alt, sum vit sóu, men vit fingu so eina hylling av, hvussu hesar øgiligu dimensjónirnar, ið vit hava lisið so nógv um í lærubókunum, síggja út í tí veruliga lívinum.





## VESTAS: MIKUDAGUR 13. OKTOBER

Tað var ein kaldan heystmorgun, vit løgdu leiðina til býin Lem, har vit skuldu vitja fyritøkuna Vestas. Eftir at hava koyrt skeivt nakrar ferðir komu vit til røttu adressu. Vit vóru væl móttiknir og fingu sess við eitt stórt fundarborð, har tað varð dekkað upp við kaffi og alskins fruktum. Her fingu vit eina framløgu á powerpoint um søguna hjá fyritøkuni, og hvussu hon er uppbygd. Eisini varð komið eitt sindur inn á, hvussu veingirnir á vindmillunum eru uppbygdir. Tá hann var liðugur at greiða frá, og vit høvdu fingið okkurt gott í búkin, gekk leiðin víðari inn í tær ymisku framleiðsluhøllirnar. Í bygningunum, vit vitjaðu, framleiddu tey veingirnar til vindmyllurnar. Tað var sera áhugavert at síggja, hvussu nógv at arbeiðinum fór fram við handamegi. Har mest sum runnu fólk í hvítum draktum við ymsum rullum av fibri og øðrum, sum skal til fyri at stoypa veingirnar. Tað gekk skjótt fyri seg.

Eftir at hava gingið í framleiðsluhøllunum millum hesar stóru veingirnar, hevur mann fingið eina fatan av, hvussu stórar hesar vindmyllurnar veruliga eru.

## EITT SINDUR UM SØGUNA HJÁ VESTAS

Fyritøkan Vestas byrjaði í 1898. Fyritøkan fekk tó ikki navnið Vestas fyrr enn í 1945, tó at tað fyrst bleiv til Vestjysk Staalteknik A/S. Hetta hildu teir vera eitt ov torført navn at nýta, so tað bleiv stytt til Vestas stutt eftir. Tað var ikki grøn orka og vindmyllur, sum tá var teirra livibreyð. Tað byrjaði sum ein stálsmiðja, har tað millum annað vóru stálvindeygarammur, ið var høvuðsøki. Gjøgnum tíðina hava tað verið nógv ymisk øki, Vestas hevur gjørt seg galdandi á, millum annað køksmaskinur, hydrauliskir kranar og ymiskir kølarar. Tað var ikki fyrr enn í 1971, at Vestas gjørdi sína fyrstu vindmyllu. Hetta var ein 3-veingja mylla, sum vit kenna tær í dag, men diameturin var einans 10 metur og effektin 30kW. Fram gjøgnum tíðina er vindmyllan hjá Vestas betrað alla tíðina, men vit síggja enn tað sama skapið við 3 veingjum sum frá byrjan. Vit síggja, hvussu langt fyritøkan er komin innan fyri økið við at hyggja eftir tí nýggjastu vindmylluni, ið hevur ein diametur uppá 112 metur og leverar eina effekt upp á 30MW. Fyri at fáa eina mynd av, hvussu stór fyritøkan Vestas er, kann sigast, at har arbeiða uml. 20.000 fólk, og at Vestas hevur sett umleið 41.000 vindmyllur upp runt í verðini.

## LEYGARDAGUR 16. OKTOBER

Sigla vit heim við Norrønu

# DRÁTTUR, KOLFÝRDUR TROLARI

Partafelagið Nevið í Hvalba keypti trolaran Drátt úr Onglandi í 1946.

Dráttur var merktur TG 788. Hann var kolfýrdur við damp-maskinu, sum var 500 HK. Hann var 363 bruttotons og var 150,6 føtur langur. Hann var bygdur í Onglandi í 1930.

Dráttur var til saltfisk um summarið og ísfisk um veturin. Saltfiskurin varð landaður á Tvør-oyri og í Keypmannahavn, og ís-fiskurin var seldur á enska fesk-fiskamarknaðinum, eina mest í Fleetwood í suður Onglandi.

Til saltfisk taldi manningin 36 mans; skipari, tveir stýrimenn, 2 maskinmenn og 4 fýrbøtarar, kokkur og messur.

Á dekkinum vóru teir sum flaktu og háladu trolið inn. Við hvørt flekiborð vóru 5 mans, ein heysari og 4 flekjarar.

Manningarrúm vóru har frammi og har afturi; 27 koyggjur vóru har frammi og 10 har afturi.

Skiparin var á brúnni, ofta so leingi hann orkaði; tá tók 1. stýrimaður við. Annar stýrimaður var á dekkinum saman við manningini; arbeitt varð eftir eini vaktarskipan



har menn svóvu 6 tímar og arbeiddu 12 tímar.

Í maskinuni skiftust 1. og 2. meistari um vaktirnar. Umráðandi var at hava dampin uppi, tí mistu teir trykkið var eingin tókraft.

Í góðum líkindum sigldi Dráttur um 9 míl.

Veitt varð í Hvíta havinum, til ísfisk og saltfisk, og undir Íslandi til ísfisk.

Saltfiskatúrarnir lógu frá 180 til gott 200 tons, og vardu frá einum mánað til hálvan annan.

Føroyska kolið kundi ikki brúkast, brennievnið var ov vánaligt. Tí var kolið keypt í Onglandi ella í Harstad í Noregi. Bunkringarnar lógu um 150 tons av koli. Til fiskarí vardi ein bunkring umleið 30 dagar.

Tað ringasta, sum kundi henda var, at kolaprísurin fór munandi upp. Hetta hendi í 1950. Tá fekst raksturin ikki at hanga saman.

9. desember 1952 yvirtekur p/f Ranin Drátt. Men tá Sjóvinnubankin fór á heysin í 1953 mistu hvalbingar bátin.

Miðvingar royndu eina tíð at reka bátin, men illa bar til, trolarin endaði sínar dagar sum gamalt jarn.



*8 føroyskir trolarar í norður Noregi. Frá vinstru: Ein svenskur bátur, Dráttur, Stella Argus, Gullfinnur, Skálaberg, Barmur, Rankin, Gøtu Tróndur og Høgi Fossur.*





Tænastan er galdandi í flest øllum Evropeiskum londum og kann bíleggjast á vodafone.fo ella við at ringja á tel. 202020. Eisini ber til at bíleggja tænastuna í handli okkara í SMS, hjá Nema, El-handlinum á Tvøroyri og hjá Ellubitanum á Sandi.

# Rock Trawldoors í Vági gongur væl

Tað gongur væl hjá Rock Trawldoors í Vági, – hóast tað sá minni gott út í fjørð heyst so sær tað meira positivt út í løtuni. Hetta greiðir Hans J. Joensen, stjóri í Rock Trawldoors, frá, í samrøðu við MIÐ & MAGN.

4. oktober 2008 var Rock Trawldoors við á eini fiskarímessu í Íslandi og ikki kann sigast annað enn, at tað gav bonus, sigur Hans J. Joensen.

Vit høvdu eitt stórt sett av lemmum við til Íslands og 4. oktober í ár fingu vit ordra nr. 20 úr Íslandi.

Íslendingar eru kendir fyri at brúka tað, sum kvalitetur er í og nakað, sum riggar. Teir hava veruliga tikið væl ímóti lemmum frá okkum.

Í summar byrjaðu vit at gera eitt nýtt model av lemmum, fyrsta settið fór yvir til Grønlands, umborð á stóra rækjutrolarin Natarnaaq.

Dávur Mohr úr Havn og Meinhard Jacobsen av Argjum eru skiparar við hesum stóra trolaranum, og teir lata sera sera væl at hesum fyrsta settinum.

Síðani hava vit so gjørt tvey sett afturat av hesum nýggja modellinum til Grønlands. So tað verður spennandi um tað verða fleiri, ið fara at skifta yvir til hetta nýggja modellið.

Hetta modellið er eitt sindur longri at gera og eini 8-9 metur meira at sveisa í einum miðalstórum lemmum og tí eru teir eisini eitt sindur dýrari, men teir eru bygdir soleiðis, at teir eru nógv sterkari enn onnur modell.

Tað eru nógv, sum spyrja hvussu vit í Føroyum kunnu kappast við útlendingar, tá tað snýr seg um at framleiða lemmar til fiskifør í Norðuratlantshavið.

Tað einasta eg kann svara er, at kvaliteturin hevur nógv at siga.



Hesin lemmurin er 13,75 fermetrar

Og her kunnu vit vísa á útsøgn frá Eyðun á Bergi skipara á Vesturvón. Hann sigur, at teir nú hava roynt við somu Super-Shark lemmum síðani juni 2007 og hava fiskað 10.000 tons av flaki við hesum sama settinum av lemmum, so hetta kann ikki kallast annað enn ein góð íløga.

Enniberg royndi i 3 ár við sínum seinasta setti og Vesturvón hevur roynt í 3½ við somu lemmum.

Havborg hevur roynt í gott og væl 3½ ár við somu lemmum. Hetta prógvar, at talan er um eina kvalitetsvøru.

Í hesum sambandi greiðir Hans frá, at hann var skipari við trolara i mong ár og, at hann minnist bara tvær ferð at hava brúkt einar lemmar í meira enn eitt ár. Og tá hildu teir í 13 og 17 mánaðir.

Vit høvdu eitt heldur vánaligt ár í fjørð, hvar lítið og onki var at gera, frá Ólavsøku og fram til november.

Í ár hevur verið nokk fyri hendurnar, vit hava havt 20 fólk í arbeiði alt árið. Talan er mest um handverkaralønir; hetta ávirkar eisini skattainntøkurnar positivt í økinum her suðuri.

Sum nakað nýtt – hava vit gjørt eina rúgvu av alibesløgum til Faroe Farming.

Tilboð eru eisini givin uppá aðra útgerð til alivinnuna, – vónandi sleppa vit inn har eisini.

Hyggja tit inn á www.rock.fo so kann ein síggja hvørji sett eru leverað í ár. Tey eru 39 í tali, sum eru seld líka frá Nova Scotia til Pusan í Suðurkorea.

Ringt er at spáa um framtíðina, men vit arbeiða við ymiskum nýggjum modellum. Til dømis eitt nýtt modell til uppisjóvartroling til makrel, svartkjaft, sild og annan uppisjóvarfisk, so tað verður spennandi, hvussu menn fara at taka ímóti hesum, sigur Hans J. Joensen, við einum brosi.

Vit hava leingi arbeitt við, at isolera høllini hjá virkinum. Tað arbeiði er nú liðugt. Nýggir útsúgvarar eru eisini uppsettir, og næsta stigið er so at byggja út til kantinu, kontór og sanitetshentleikar, sigur Hans J. Joensen at enda.




1940 | 2010
- tryggleiki í sjeyti ár
Kr. 3.176,00 *
21. januar
kemur kekkurin
Um tú í 2010 hevur goldið kr. 18.000 ella meira inn til Betri pensjón, fært tú útgoldið 20% av tínum inngjaldi til privatar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Hesin avsláttur verður útgoldin við kekki 21. januar 2011. Tað kann lættliga gerast talan um fleiri túsund krónur.
Á trygging.fo sært tú, hvussu tú kanst fáa upp til heili 32% í avsláttri frá Betri pensjón og Tryggingarfelagnum Føroyum.
trygging.fo
* Upphæddin er tilvildarlig
Betri pensjón
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari